Minningarorð um

# Annu Ljósstein, f. Arnason (Anna hjá Hans Kaj)

f. 25. mai 1920 d. 19. juli 2006



Tað er nú eitt ár farið aftur um bak síðan okkara elskaða mamma, omma og langomma læt eyguni aftur fyri seinastu ferð. Saknurin er líka stórur enn hjá okkum øllum.

Mamma var fødd í Skopun. Hon vaks upp hjá Andreu Løwe (didigummuni) og Jettu ommu. Har kom hon bert 12 dagar gomul. Mamman var sjúk, og hon kláraði tí ikki at taka sær av henni. Pápin, sum var íslendingur, bað didigummuna taka sær av henni, tí at hann væntaði ikki at hon fór at yvirliva.

Mamma kom so á ungum árum norður til Klaksvíkar at tæna. Har møtti hon babba fyri fyrstu ferð, og tað bleiv par burtur úr teimum. Seinni giftust tey og fingu heili átta børn. Tey komu øll væl undan.

Tá ið vit vóru smá, gjørdist babba sjúkur av tuberklum og bleiv koyrdur til Havnar á Sanatoriið í Hoydølum. Har var hann koyrdur út og inn ígjøgnum nógv ár.

Mamma var tí nógv einsamøll um okkum átta systkin. Vit vóru ógvuliga góð við mammu og hon við okkum. Vit fingu nógvan kærleika, og sjálvt um ikki nógvir pengar vóru um hendi, so blivu vit ongantíð gloymd, og okkum manglaði ongantíð nakað. Altíð gjørdi mamma nógv burtur úr høgtíðunum fyri at gleða okkum. Hon hugsaði altíð um okkum fyrst. Eisini gjørdi hon nógv fyri onnur, sum høvdu brúk fyri hjálp.

Hon var altíð klár at hjálpa, og ikki sást tú nakað arbeiði liggja eftir, har sum mamma hevði verið. Mamma var ein røsk og sterk kona. Var nakað áfatt, so hevði hon altíð loysnina beinanvegin.

Tey fyrstu árini búðu vit úti á Norðoyri. Seinni bygdu mamma og babba síni egnu hús uppi í Gerðum í Klaksvík. Nógv fólk plagdu at koma inn á gólvið, og altíð var pláss fyri einum afturat. Har var eisini altíð nokk av mati. Eingin skuldi ganga svangur. Eftir at babba doyði í 1988, búði mamma ongantíð einsamøll. Har var altíð onkur hjá henni, antin børn, ommubørn ella langommubørn. Tað dámdi henni best, at hava onkran hjá sær.

Henni dámdi best at vera mittpunktið, tá vit øll vóru saman til høgtíðir og føðingardagar. Henni dámdi eisini so væl at syngja.

Tey seinastu árini búði mamma inni hjá Eyðfríð og Olgar. Har dámdi henni væl at vera, og har bleiv hon væl passað.

Mamma var nógv rundan um okkum ta seinastu tíðina. T.d. á páskum í fjør var hon við okkum úti á Norðoyri og rullaði egg. Tað var stuttligt. Og tá mamma hevði føðingardag 25. mai í fjør, tá hildu vit stóran føðingardag fyri henni. Tað var hon sera glað fyri.

Nógv eru minnini um mammu og tey verða goymd í okkara hjørtum so leingi vit liva. Mamma fylti so nógv, og har er eitt stórt tómrúm, nú hon ikki er millum okkum longur.

Mamma er øgiliga nógv saknað, men hon verður ongantíð gloymd. Vit vita at vit einaferð møtast aftur heima hjá Jesusi. Og tá er babba eisini har.

Hvíl í friði, góða mamma.

*Gakk tú fram við góðum treyst*
*tú ert ei aleina;*
*Harrin tó er tann, ið best*
*leiðirnar kann beina.*

*Firnast ikki myrkur svart,*
*bjartar stjørnur standa;*
*hevur faðirvár tú lært,*
*óttast tú ei vanda.*

*Fyri tí, tú veitst er rætt,*
*doyggj, um so má vera;*
*tá skal lívið falla lætt,*
*deyðin einki gera.*

**Børn, verbørn, ommubørn og langommubørn**

***Minningarorð um okkara kæra bróðir***

# *Signar Vilhelmsen*

13.11.1971-13.05.2007

*Tung vóru boðini úr Føroyun, um at beiggi okkara var tikin frá okkum á so ungum aldri. Vit vóru øll, foreldur og syskin, samlaði, niðri í Danmark í konfirmatión, so tað var hart, at vit ikki kundu vera har, men bara skuldu bíða eftir næsta flogfari til Føroya. Signar fekk sum 33 ára gamal staðfest hjartafeil, sum nú heilt óvæntað vísti seg at vera álvarsamari enn hildið.*



***Góði elskaði stóribeiggi***

*Alt for tíðliga bleivst tú tikin frá okkum. Giftur við tínum ungdómskærleika, elskaði hana av øllum hjarta.*

*Børn var tykkara hægsta ynski, men tað skuldu ganga ár áðrenn tit endiliga fingu tað uppfylt – ein stór gáva. Hann var tín gullklumpur. Stoltleikin og kærleikin lýsti úr eygum tínum.*

*Fótbóltur var tín stóra interessa – um arbeiði vildi, koyrdi tú Føroyar runt og hugdi at FS-Vágar. Liverpool var eisini títt favorit lið. Vit øll fingu boð um at finna eina Liverpool blusu til lítla sonin*

*Allan Paula – Vit náddu tað ikki áðrenn tú bleivst tikin frá okkum, men beiggi hevur funnið eitt heilt sett nú. Vit kunnu bara síggja teg fyri okkum, hvussu stoltur tú hevði verið at sæð hann í tí.*

*Signar, -okkara stóribeiggi- Stórt ansvar at hava, og tú fylti tað til fulnar. Aldrin kom eitt ringt orð av munni tínum, altíð klárur at lurta, um man hevði nakað uppá hjarta, og at verja ein um tað var brúk fyri tí. Eitt hjarta av gull, eitt sinnarlag so róligt, at man ikki visti av tær, fyrr enn tú stóð við okkara lið.*

*Orð kunnu ikki beskriva teg sum persón, tí kendi man teg, vóru orð óneyðug.*

*Vit sum eftir sita kunnu ikki forstanda, at tað skal vera so. Hví kundi hann ikki fingið fleiri ár saman við okkum. Hví skuldi hann verða tikin frá okkum, sínari ungu konu, sum hann elskaði so høgt, sínum elskaða soni, sum hann endiliga hevði fingið, og frá foreldrum okkara, sum vóru so stolt av, at hann hevði keypt hús beint við síðuna av hjá teimum, og nú tá ommu og abbabørnini byrjaðu at koma, kundi tað ikki vera betri. Man kan blíva bittur, men tað hjálpir ikki. Vit mugu bara takka fyri tey gódu árini, vit náddu at fáa saman við tær elskaði beiggi.*

***Hvíl í friði góði.***
***Ynskja Systkini***

# Farmakonomar fingið prógv



27. juni 2007 fingu Jóhanna Jacobsen, Skálavík, og Fríða Marjunardóttir, Vestmanna, prógv sum farmakonomar á Tjaldurs Apoteki í Tórshavn.

Útbúgvingin sum farmakonomur tekur trý ár. Ein partur av útbúgvingini er á apotekunum í Føroyum, meðan skúlin er í Hillerød í Danmark, har næmingarnir eru sjey ferðir í tey trý árini, útbúgvingin tekur.

*Farmakonomar sum fingu prógv 27. juni 2007: Fríða Marjunardóttir og Jóhanna Jacobsen*

## Dagurin

**12. juli.** Heinrikur, deyður ár 1024. Týski keisrain Heinrikur II var giftur við Húngunn, sum læt byggja bæði kleystur og kirkjur. Pavin Eugen III skírdi Heinrik halgimenni í árinum 1146. Upprunaliga tyskt navn, samansett av orðunum heim og ríkur.